

nsen, formaður í Sláið Ring, Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, Theodor E. D. Olsen, prestur og Magnus Magnussen, toastmaster

Mynd: Leo Poulsen

## Skapt soleiðis

Hann greiddi eisini frá, at fyrr í tíðini niður gjøgnum alt Europa var ikki vanligt við vígslubrævi, og tí var einasta trygd fyri, at pør vórðu gift, at fólk mintust hátíðarhaldið.

- Tað var tí, tað var so neyðugt við brúðarfólki. Brúðarparið gekk í skrúgongu gjøgnum bygdina fyri at fólk skuldu minnast hetta og á tann hátt kundu vátta, at fólk veruliga vóru gift, segði Jóan Pauli Joensen.

Rektarin á Fróðskaparsetrinum dugdi sera væl at greiða frá, og kryddraði sítt innslag við skemtiligum søgum.

Hann greiddi frá brúðgómi, sum brúdleypsnáttina hevði goymt sær eina fløsku av góðum cognac niður við seingina, men nú hann skal tørna inn, sær hann, at fløskan er drukkin niður um hálsin.

»For ólukkan, letur í honum, her hevur onkur verið áðrenn«

»Nei, nei, sigur brúðurin í seingini, soleiðis eru vit konufólk skapt í okkara familju«.

Brúðardansurin hevur eisini altíð verið sera heilagur, so heilagur, at hann sakt-ans kundi dansast í føstu, og fólki, ið bar sorg, var eisini loyvt at dansa uppi í brúðardansinum.

Jóan Pauli Joesen rundaði av við at greiða frá, at talur við brúdleypsborðið er nýtt fyribrigdi, og kundi vera bæði gott og ringt. Hann fortaldi um tann eina pápan til brúðrina, ið avgjørt ikki var nakar røðari, men sum kortini mátti reisa seg upp við brúdleypsborðið. Talan var stutt:

»Mín góða dóttir, eg vóni, at tú verður betri við tín mann, enn mamma tín hevur verið við meg«.

## Hugaligt kjak

At enda var tað so formaðurin í Sláið Ring, Rasmus Joensen, ið fekk orðið. Hann kom ikki óvæntað inn á royndirnar at finna fram til eina nýggja brúðarvísu, og greiddi eisini eitt sindur frá samstarvinum við Kringvarpið í vetur.

Hann helt, at fólk yvirhøvur hava lítlan kunnleika til brúðardansin og ta tign, hann hevur, og tí hava tey ikki somu meining um dansin, sum skipari og brúðarpar hava.

- At brúðarvísan tá er long og ongan enda tykist fáa, fær fólk til at kenna eina negativa kenslu til brúðardans og føroyskan dans yvirhøvur, segði Rasmus Joensen.

Formaðurin kom eisini inn á tey praktisku tingini í sambandi við brúðardans. Eitt nú traditiónina, at ikki verður skonkt í ringinum, meðan brúðarvísan verður kvøðin.

- Nakað annað, sum er ómetaliga forstýrandi, er, um barrin letur upp, áðrenn brúðardansin, tí tá verður ofta málageipan rundan um har, og hetta hevur ofta lyndi at køva vísuna, segði Rasmus Joensen.

Hinvegin metti hann, at føroyski dansurin í løtuni er á veg uppeftir, og tað er í hvussu er nakað at frøast um.

Eftir tey fýra innleggini var kjak, og hetta gjørdist bæði drúgv og lívligt. Nógva umrøðu fekk kirkjan í brúdleypshøpi, og umrøtt varð, hvørt tað mundi verða sømiligt, at dansa og kvøða brúðarvísuna í kirkju ella missiónshúsi.

Eisini spurningurin um nýggja brúðarvísu fekk drúgva umrøðu. So drúgt gjørdist kjakið, at tiltakið gjørdist væl drúgvari enn væntað.

Kvøldið endaði við, at farið var upp á gólv. Tikin vóru tíggju ørindi av ávikavist donsku brúðarvísuni, teirri føroysku og av Harra Pætur og Elinborg.



*Eftir pallborðsfundin varð farið upp á gólv. Millum prest og Poul Mohr dansar ein av nútíðar kvæðakempunum, Petur Olivar í Hoyvík, vanliga nevndur Gimpe*

Mynd: Jan Müller